## DAGSINS MEINING

# Frambrot á sjálvstýrisleið

Løgmaður og forsætismálaráðharrin undirskrivaðu mánadagin 4. apríl í ár avgerðandi og týdningarmikla yvirlýsing um framløgu av yvirtøkulóg. Yvirtøkulógin er eitt stórt frambrot. Við hesum fáa føroyingar eitt avgerðandi amboð til at fremja tey stig á tí sjálvstýrisleið, ið føroyingar sjálvir ynskja og vilja halda. Nýggja yvirtøkulógin verður í næstum løgd fyri tingið, og verður hon ætlandi sett í gildi á ólavsøku. Sum flestøll minnast, so rendi fyrra samgongan seg fasta í fullveldismálinum. Lagt varð tí á annan bógv við Tvøroyraskjalinum, men so kom tann samgongan ikki longur. Henda samgongan hevur so tikið málið upp aftur. Við at tala um eina breiða tjóðskaparliga semju hevur verið samráðst við danir um eina skipan, sum í roynd og veru flutti sjálvstýrismálið heim til Føroya. Hetta er eydnast við yvirlýsingini, ið varð undirritað mánadagin.

Við tí yvirtøkulóg, sum fylgir av yvirlýsingini, kunnu øll málsøki yvirtakast, tá føroyingar sjálvir taka avgerð um tað, uttan nøkur neyvari nevnd mál nevniliga stjórnarskipan danska ríkisins, heimarætt, hægstarætt, uttanríks-, trygdar- og verjupolitikk og so gjaldoyra- og peningapolitikk.

Í yvirtøkulógini verður sostatt ásett, hvørji mál ikki kunnu yvirtakast. Av hesum fylgir so, at øll hini kunnu yvirtakast. Sostatt verða økini, sum kunnu yvirtakast, munandi víðkað og tilgongdin verður nógv lættari. Dómsvald, revsirættur, persóns-, familju- og arvarættur, fíggjarrættur og útlendingamál eru dømi um stór og týdningamikil mál, ið ikki eru nevnd í heimastýrislógini, men sum føroyingar eftir nýggju lógini kunnu velja at gera til føroysk málsøki. Øll mál kunnu sostatt yvirtakast, uttan tey, ið sum nevnt beinleiðis eru tengd at ríkisfelagsskapinum.

Tað er vorðið sagt, at yvirlýsingin er eitt frambrot á sjálvstýrisleið. Hesum eru vit samd í. Tá hugsað verður um, hvussu nógva orku undanfarna samgonga legði í hetta málið uttan at koma úr stað, so má ásannast, at yvirlýsingin, sum varð undirskrivað mánadagin er eitt diplomatiskt og politiskt bragd. Yvirlýsingin kemur at standa fyri eftirtíðini sum ein varði í politisku starvsleið løgmans. Tá, ið sjálv yvirtøkulógin er vorðin samtykt, er tjóðskaparliga semjan um sjálvstýrisleið og sjálvstýristilgongd so at siga fingin umborð. So skuldi politiskur friður valda um eitt hitt største málið í føroyskum politikki. Síðan kann samgongan fara undir at loysa tey mongu politisku mál, sum hava ligið á láni tey seinastu árini. Her eru stór mál at taka upp á øllum samfelagsøkjum og frá nú av er eingin umbering fyri ikki at loysa hesi stórmál.

Skulu vit taka samanum, so er yvirlýsingin sum nevnt størsta frambrot á sjálvstýrisleið síðan heimastýrislógina. Yvirlýsingin merkir eina nútímansgerð av politisku tilgongdini í sjálvstýrismálinum. Hetta er gott, men hetta er kanska ikki tað stóra frambrotið í sjálvum sær. Tað stóra frambrotið er, at danska stjórnin við at undirskriva yvirlýsingina hevur viðurkent føroyingar sum eitt fólk sambært fólkarættin eins og stjórnin hevur viðurkent okkara tjóðskaparliga sjálvsavgerðarrætt. Nú eru flestu forðingar fyri føroyskum tjóðarfrælsi beindar burtur. Nú er avgerðin okkara og bert hvørja leið, ið vit ætla at halda.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit hildu lyftið: Sjálvstýrissemjan er funnin

**Hetta er størsta søguliga hendingin síðani heimastýrislógina frá 1948. Sjálvstýrismálið er nú føroyskt burturav. Tað er ikki longur neyðugt við samráðingum við danir um yvirtøkur. Nú kunnu føroyingar yvirtaka mál og málsøki gjøgnum løgtingslóg, um vit ynskja tað, og tá vit ynskja tað**



**John Johannessen,**
*løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin*

Við Javnaðarflokkinum á odda hava vit í dag tikið tað størsta veruliga sjálvbjargnisstigið, sum tikið er í føroyskari søgu síðani heimastýrislógina í 1948.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Anders Fogh Rasmussen hava við felagslýsingini í dag lagt navn til eitt nýtt tíðarskeið í føroyskum politikki. Sjálvstýrismálið er ikki longur eitt stríð ímillum føroyskar og danskar myndugleikar, men eitt føroyskt mál burturav. Tíðin, har neyðugt var at biðja danir um loyvi at sleppa at taka yvir málsøki er av. Vit hava yvirtikið sjálvt sjálvstýrismálið, soleiðis at tað nú beinleiðis er Føroya fólk, sum gjøgnum Løgtingið ger av, nær málsøki verða yvirtikin og hvørji málsøki verða yvirtikin.

### Sterk semja — C lykilin

Tað hevur síðani fullveldislandsstýrið staðið púra greitt, at ikki bar til at røkka semju og loysnum á sjálvstýrismálinum, uttan at Javnaðarflokkurin gjørdist lykilin. Hvørki bar til at finna semju við danir ei heldur flokkana millum her heima.

31. januar í fjør eydnaðist Javnaðarflokkinum at skipa samgongu við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin í breiðari politiskari semju um sjálvstýrismálið.

Nú gott ár seinni hava vit rokkið semju við danir. Einari sterkari semju um eina yvirtøkulóg við stórum meiriluta av Løgtinginum og øllum Fólkatinginum aftanfyri.

Á ólavsøku í ár kemur yvirtøkulógin í gildi og harvið eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari søgu.

Vit valdu gott og virðiligt samskifti og fingu veruligar loysnir.

### Virðilig og góð loysn

Tá Løgtingið og Fólkatingi í hvør sínum lag samtykkja yvirtøkulógina, verða A og B listarnir í heimastýrislógini ikki longur galdandi. Tað vil siga, at tað ikki longur verður ásett á nøkrum lista, hvørji mál vit kunnu yvirtaka. Og heldur ikki verður kravt, at vit skulu samráða okkum fram til loyvi at yvirtaka.

Í staðin verður høvuðsreglan í Yvirtøkulógini galdandi, sum sigur at øll mál, sum ikki eru knýtt at sjálvari fullveldistøkuni, kunnu yvirtakast, tá meiriluti er fyri tí á Løgtingi.

Stóra nýskipanin við yvirtøkulógini er, at hon leggur upp í hendurnar á føroyskum myndugleikum einamøllum at gera av, nær málsøki bæði innanfyri og uttanfyri heimastýrislógina koma á føroyskar hendur.

### Andstøðan kann vera við

Vit hava uttan iva rokkið einari loysn á sjálvstýrismálinum, sum eisini Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin í andstøðu eiga at kunna taka undir við. Hetta serliga, tá hugsað verður um, at allir flokkar á Løgtingi halda fram í arbeiðinum at gera føroyska stjórnarskipnarlóg. Og at tað í stjórnarskipanarlógini greitt skal vera ásett, hvussu vit føroyingar skulu bera okkum at, um vit einaferð í framtíðini koma til ta avgerð, at vit velja at siga upp verandi ríkisrættarligu støðuna.

Men spurningurin, um andstøðan vil vera við, er ein spurningur, hvørt Tjóðveldisflokkurin er til reiðar at góðtaka, at avgerðin nú liggur hjá føroyingum. At sjálvstýrisstríðið nú er ein spurningur um politiskan meiriluta á Føroya Løgtingi, heldur enn áhaldandi herróp og stríð við danir um endaliga málið, uttan at røkka úrslitum.

Mín vón er, at eisini Tjóðveldisflokkurin ynskir at vera við til at skapa breiða semju um størsta sjálvstýrisstigið, sum tikið er síðani 1948.

# Fjølmiðlaábyrgdarlógin

**Svar til Johan Petersen**



**Jógvan á Lakjuni**
*landsstýrismaður*

Johan Petersen spyr í bløðunum, nær eg sum landsstýrismaður í útvarps- og sjónvarpsmálum fari at leggja fjølmiðlaábyrgdarlógina fyri tingið.

Nú er tað soleiðis, at hóast landsstýrismaðurin í mentamálum umsitur fjølmiðlarnar, kringvarpslógina o.s.fr., so umsitur hann ikki fjølmiðlaábyrgdarlógina.

Fjølmiðlaábyrgdarlógin er lógarmál og verður tískil umsitin í Innlendismálaráðnum, og best er hjá Johan at venda sær hagar at fáa meira at vita.

Annars eru samgonguflokkarnir samdir um at yvirtaka fjølmiðlaábyrgdarlógina, men eg havi skilt, at bíðað hevur verið eftir yvirtøkulógini.

Nú, ið tað røkist fyri, at hon verður sett í gildi á ólavsøku, skuldi einki forða fyri, at fjølmiðlaábyrgdarlógin verður løgd fyri tingið í næstu tingsetu.

Vónandi verður tað so, tí tørvur er á henni!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.